Formansfrágreiðing 2016

Lívið, kunnu vit siga, er eins og eitt mosaikk. Eitt mosaikk, sum er sett saman av eini mongd av brotum – við tíðini gerst hetta okkara lívsmosaikk. Løtur, avbjóðingar og upplivingar eru brotini, sum verða sett saman og við tíðini geva tey mosaikkinum skap og litir. Nøkur brot eru ljós og klár, onnur eru myrk og grov, summi eru rund og bleyt, og onnur eru hvøss.

Vit kenna tað væl. Til tíðir kennist lívið gott, brotini leggja seg líkasum sjálvi, og myndin tykist natúrliga at taka skap. Til aðrar tíðir kennast brotini øðrvísi. Tey passa líkasum ikki saman, og vit fara kanska at ivast í, um hetta nakrantíð fer at gerast ein mynd, sum gevur meining.

Bæði sum forkvinna í MBF og sum lærari møti eg av og á fólki, sum ikki síggja vøkru myndina, sum gevur meining. Tað tykist sum um, at onkur hevur skakað brotini, og tey eru farin í ymsar ættir. Fyri at lívið aftur skal geva meining, fara tey at leita eftir brotunum, og summi leita leingi. Fólk koma onkuntíð at hjálpa, men ikki altíð er tað nøkur hjálp. Tey leita víðari, og soleiðis kenna vit heilt vist løtur í lívinum, har vit ikki síggja møguleika fyri eini mynd, sum gevur meining. Vit ganga og leita eftir tí, sum manglar.

Men menniskju eru oftast soleiðis háttað, at vit í løtum, avbjóðingum og upplivingum mennast við uppgávuni, og við tíðini verða myrkastu brotini ikki tey, sum oyðileggja myndina. Tó at tey ljósu brotini eru nógv lættari at leggja, so eru tað jú bæði ljósu og myrku brotini, sum geva vakrastu myndina. Hetta kann t.d. vera ávirkað av umstøðum okkara í gerandisdegnum – bæði nær okkum og umstøður annars í samfelagnum.

Í Føroyum er enn nakað at arbeiða við

Við hesum í hugsa stillaði eg, fyri tveimum árum síðani, upp til forkvinnu í MBF. Tað hevur stóran týdning, at samfelagið javnan gerst varugt við, at føroyingar eru ymiskir og tí hava ymiskan tørv. Hetta ynski eg framhaldandi at virka fyri.

Enn liva vit í einum landi, um hevur tørv á felagsskapum, sum gera vart við rættindi teirra, ið bera brek. Enn liva vit í einum landi, sum ikki á nøktandi hátt lýkur krøvini, sum ST sáttmálin setir. Ja, vit kunnu væl vera samd um, at her er nakað at arbeiða við.

Tit, sum sita her, vita hetta sum eingin annar. Eg vil fegin takka tykkum fyri tykkara arbeiði, sum á mangan hátt nevniliga vísir, hvat enn er eftir. 24 limafeløg, sum á 24 ymiskum økjum arbeiða fyri, at Føroyar skal vera eitt gott landa at búgva í hjá fólki, ið ber brek – júst sum eisini missiónin hjá MBF sigur.

Frambrot eru at hóma

Við hesi missión hava vit nú, enn eitt ár, arbeitt, og kunnu fyri fyrstu ferð síggja aftur á eitt ár, har vit av álvara arbeiddu við niðurstøðunum frá ST til Føroya Landsstýri sum grund. Hetta er í sjálvum sær eitt frambrot og er við til at gera uppgávuna ítøkiliga.

Vit kunnu fegnast um, at Almannaráðið er farið undir eina tilgongd, har bólkur er settur at arbeiða við, hvussu ein mannarættindastovnur kann verða skipaður í Føroyum.

Vit kunnu fegnast um, at kring landið eru nýggir bústaðir bygdir, har fólk hava fingið møguleika í góðum karmum at skapa sær eitt mennandi lív. Almannaráðið hevur í ár sett 60 milliónir av til bústaðir serliga í Suðurstreymi, tí í økinum nógvir bústaðir í ringum standi.

Innan miðnám eru eisini góðar søgur. Í august 2015 byrjaði ein flokkur av næmingum á serbreytini á Kambsdali, og í ár byrja flokkar bæði á Glasi og á Tekniska skúla í Klaksvík. Hetta er umframt tað, sum longur varð byrjað.

Eisini var fløvandi at uppliva, at lógardeildin á Løgmansskrivstovuni sendi boð eftir MBF, tí tey ynskja at lógarsmíð í framtíðini skal byggja á ST sáttmálan.

Atkoma áhaldandi á skrá

Atkoma er alsamt eitt álvarsmál. Á altjóða brekdegnum varð úrslit av verkætlan, har Visit Tórshavn hevur kannað atkomumøguleikar til matstøð og gisting fyri fólk, sum sita í koyristóli, løgd fram. Ein vestnorðurlendsk verkætlan innan atkomu til ferðavinnu er byrjað, og er ætlanin at gera eina hondbók um atkomu.

Enn stríðast vit viðvíkjandi sendingum í KVF, har MBF áhaldandi hevur havt samskifti bæði við Mentamálaráðið og KVF fyri at vísa á tørvin á at sendingar verða tekstaðar og teknmálstulkaðar - enn er tó langt á mál.

MBF og limafeløgini

Formansfundirnir eru okkara forum. Her hava vit møguleika at møtast og viðgera tað, sum er viðkomandi fyri brekøkið. Limafeløgini eru ymisk – bæði í stødd og avbjóðingum. Tað var hugaligt í november og aftur fyrr í ár at hoyra formenninar greiða frá virksemi teirra, sum tað eisini var viðkomandi at hoyra teir seta orð á, hvat MBF møguliga eigur at gera øðrvísi og/ella betri. Her eiga vit at arbeiða víðari og styrkja um samstarvið, so vit kunnu gagnnýta hvønn annan og fáa innlit í, hvat limafeløgini arbeiða við.

Í ár eru tað 35 ár síðani MBF varð stovnað. Søgan hjá felagnum byrjar sjálvan dagin hjá sameindu tjóðum í 1981, og nú 20 mai í ár hátíðarhalda vit hetta tíðarskeið í Norðurlandahúsinum við lívssøgum, framløgu, hugleiðingum og tónleiki. T.d. fara fyrrverandi forkvinnur/-maður at luttaka.

MBF hevur øll árini verið eitt virkið felag, sum áhaldandi hevur arbeitt við brekpolitikki, ið umfatar øll samfelagsviðurskifti, og hevur virkað fyri at fáa ávirkan og at verða hoyrd í málum, ið viðkoma fólki, ið bera brek. Ása Ellefsen (1981-1984), Trygvi Jacobsen (1984-1985), Margreta Næss (1985-1994), Doris Hansen (1994-2002), Marjun Sigurðsdóttir (2002-2004), Leila Solmunde (2004-2012) og Carita Bjørklund (2012-2014) hava øll á sín hátt verið andlitið út í samfelagið, og eru vit takksom fyri tey, og eisini tey, sum hava staðið saman við teimum.

Serstakliga spennandi er eisini, at MBF 20. mai letur úr hondum nýggja bók um ST sáttmálan. Bókin er ætlað børnum og vaksnum at lesa í felag, og vón okkara er, at hon kveikir áhugan hjá føroyingum sum heild fyri rættindum, sum eru so grundleggjandi fyri okkum, sum bera brek.

Lívið er samansett – eins og MBF er tað. MBF er á sín hátt eisini eitt mosaikk, sum vit framhaldandi saman kunnu skapa við ymsum brotum og litum. Okkara avbjóðing er at gera vart við, at í Føroyum er enn nakað á mál. Við visjónini hjá MBF um at fólk, ið bera brek, skulu hava javnrættindi í einum inkluderandi samfelag, fyri eygað, er vón mín, at vit komandi árið koma enn longri á mál.

Takk fyri!

Tóra við Keldu, forkvinna í MBF